LM-099/2023

Fylgiskjal 34

HVANNASUNDS KOMMUNA

Sundsvegur 6
FO- 740 Hvannasund
Tel. +298 452007
hvannasund@hvannasund.fo
www.hvannasund.fo

Uttanríkis- og

vinnumálaráðið

Hvannasund, 22. februar 2024.

## Viðmerkingar til lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnu

Fyrst er at siga, at tað er gott, at stig eru tikin til at skipa hetta økið við lóg. Tað er ikki haldbært við støðuni, sum hon er. Hinvegin hava vit nakrar viðmerkingar, sum koma niðanfyri.

§1 Ongin viðmerking

§2 Ongin viðmerking

§3 Ongin viðmerking – uttan tað, at tað er týdningarmikið at undirstrika ásetingina um avmarkingar og skyldur, *sum eru ásettar í hesi løgtingslóglóg, í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg ella í øðrum løgtingslógum og fyriskipanum*. Ein skipan, sum kommunan ásetur í samstarvi við hagastýrið verður sjálvsagt eisini ein áseting í hesum sambandi.

§4 Hundur kann loyvast í sambandi við leiting og bjarging.

§5 Aftur her eigur ein skipan, sum kommunan og eigari/brúkari eru komin ásamt, at skipa (og møguliga avmarka) virksemið í økinum. Fyrivarni verður tikið fyri, hvat *standardavtala* inniber. Umstøðurnar á teimum ymsu plássunum eru so ymisk, at *ein* avtala neyvan kann galda alla staðni.

§6 Ferðavinnuætlan – ella -skipan. Vit síggja fyri okkum, at til ber at gera nakrar generellar reglur fyri hetta virksemið í okkara kommunu beinanvegin, men nøkur viðurskifti fara at krevja nærri viðgerð og eftirmetingar, og ikki er vist, at alt hetta kann røkkast fyri 1. juni 2025. Ein raðfesting má gerast, soleiðis at øki, sum hava størstan tørv á regulering, verða raðfest fremst.

Í hesum sambandi eigur at vera heimild fyri at krevja, at *allir bólkar skulu* hava ferðaleiðara, sum er góðkendur og skrásettur av kommununi á staðnum. Á tann hátt kann tryggjast eitt smidligt samskifti við tey, sum umsita jørðina, so teir góðkendu ferðaleiðararnir t.d. kunnu vita um serligt virksemi í haganum.

Og ikki minst at inntøkurnar kunnu fella til lokalu økini. Tað vil t.d. siga, at incoming-feløg hava skyldu at nýta ferðaleiðarar úr góðkendu skránni hjá kommununi, um ferðavinnuskipanin í kommununi krevur tað.

§7 Ongin viðmerking

§8 Fyrivarni verður tikið fyri, at inntøkur og útreiðslur eiga at samsvara í mest møguligan mun, so at útreiðslurnar ikki verða í ov stórum ósamsvari við inntøkurnar.

Heimild eigur at vera fyri at taka gjald fyri parkering – og fyri at vísa bussar til serstaka bussparkering.

§9: Ongin viðmerking

§10: Ongin viðmerking

§11: Ongin viðmerking. Tó verður í hesum sambandi spurningurin um trygging tikin fram. Ferðafólk eiga at vera mint á, at kommuna ella eigari/brúkari ikki hava nakra ábyrgd í sambandi við gongd í haga, at øll gongd er fyri egna ábyrgd. Og at tað er neyðugt at hvør einstakur hevur sína trygging í lagi.

§12: Ongin viðmerking uttan tann, at fyrivarni verður tikið fyri innihaldi í komandi kunngerð í hesum sambandi.

§13: Ongin viðmerking

§14: Sí viðmerking til grein 8

§15: Ongin viðmerking

§16: Ongin viðmerking

§17: Ongin viðmerking

§18: Ongin viðmerking

Vegna

Hvannasunds kommunu

Katrin Næs

*borgarstjóri*